## DAGSINS MEINING

### Samgongusjónleikur

Orðið sjónleikur hevur verið eitt nógv nýtt orð av formanni Tjóðveldisfloksins. Ikki er ilt at síggja, hví hesin altíð illteinkir onnur fyri sjónleik og spæl fyri gallarínum ol. Tað tykist sum um, at tað longu í síðstu viku var greitt, at Tjóðveldisflokkurin fór at svølgja alt, og at samgongan skuldi halta víðari. Hvat var so endamálið við vikuskiftisfundunum? Var endamálið bert at manipulera tað, ið skuldi koma í fjølmiðlarnar? Tað er lemjandi fyri trúvirðið hjá størsta samgonguflokkinum, tá hesin soleiðis letur almenningin halda, at tað langt frá er vist, at samgongan yvirlivir, um flokkurin longu frammandundan hevði avgjørt at bakka, ið hann so mangan hevur gjørt fyrr. Føroyskur politikkur hevur í so máta verið rættiliga óspiltur. Tilrættislagdar lesarabrævkampanjur, frammanundangjørd manuskript fyri fjølmiðlaspæl oa. hevur tíbetur verið fremmandur fuglur í Føroyum. Nú sær tíverri út til at vent er í holuni.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum kom m.a. fram uppá at fortelja føroyingum um stórar danskar konspiratiónir, við duldum dagsskráum. Rættiliga ironiskt at júst hann tykist at vera dottin í grøvina, har sjónleikur verður spældur fyri fjølmiðlunum, meðan avgerðirnar langt síðani eru tiknar handan leiktjøldini. Nú sigur flokkurin, at hann fyrireikar seg til allar støður. Hesin hevði staðið seg betur, um hann fortaldi Føroya fólki, nær avgerðin, um at verða verandi í samgongu veruliga var tikin. Eisini kundi hann hóskandi víst okkum orðingar í arbeiðsskjalinum, ið tók hædd fyri, ikki framhaldandi samgongukreppu, men samgongusliti. Hetta er ivaleyst eisini í brævinum sent til allar tinglimir og floksstjórn – ella hvussu?

### Hattin av fyri SvF

Oftani verður sagt, at fjølmiðlarnir eru 4. statsmaktin men at teir røkja ikki altíð hesa uppgávu nóg væl. Ikki eru umstøðurnar hjá miðlunum tær bestu. Teir eiga tó eisini at taka í egnan barm og viðganga, at ofta er talan um mikrofonhaldarí, har politikarar og stýrandi hava ov lætt spæl. Nú kom so sjónvarpið við eini søgu, sum eftir tað verður tillátursgjørd av formanni Tjóðveldisfloksins. Men hattin av fyri sjónvarpinum. Tíðindi vístu sannleikan í tí, ið vit í oddagrein í gjár nevndu glantrileikin, ið helt fram. Skjalið SvF hevur fingið innlit í prógvar hetta.

Hvussu hetta enn verður snarað, hevur tað nakað við manipulatión at gera, ið er eitt tað vandamiklasta fyri fólkaræðið. Tað er ikki so langt síðani, at tað kom fram eisini av óvart, at fólk, ið stóðu leiðsluTjóðveldisfloksins nær, buðu sær til at skriva lesarabrøv við tí fyri eygað at finnast at løgmanni. Var tað ikki eisini ein formur fyri manipulatión. Í hesum føri hevur SvF víst mans mót, tá tað fekk fatur í skjalinum og valdi at vísa tað. Tað kundi jú eisini hent, at tað var farið aftur við borðinum.

Annars eigur at verða rópt varskó, nú samgonguflokkar vilja leggja bond á demokratiið og frælsið hjá tingmonnum at siga sína hugsan. Fyri at varðveita samgongu skal setast inn eitt eftirlitsfiltur millum Løgting og Landsstýri. Nú skal einki út, sum kann seta spurnartekin við samgongu. Tvs. bond skulu leggjast á tað mest heilagu skylduna hjá fólkavaldum, nevniliga hana at kunna siga sína meining og eisini kunna finnast at sínum egnu. Tað er eins stórur vandi fyri demokratiið sum manipulatión!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ja, Tjóðveldisflokkurin fyrireikar seg til allar støður

**Høgni Hoydal**



Í Degi og Viku í gjárkvøldið var høvuðssøgan, at Tjóðveldisflokkurin hevði fyrireikað seg til at leggja fram sínar niðurstøður um samgongusamstarvið.

Hendan sera skemtiliga søga bygdi á eitt pappír, har Tjóðveldisflokkurin hevði skrivað niður sínar niðurstøður um samgongusamstarvið. Á hesum pappírinum varð eisini lagt upp fyri og fyrireikað, at um samgongukreppan stóð við ella versnaði, so mátti Tjóðveldisflokkurin eisini í felag greiða frá sínum niðurstøðum á einum tíðindafundi.

Ja, tað skulu vit erliga viðganga. Vit høvdu fyrireikað okkum til allar møguleikar. Tað gera vit altíð. Tað finnast óteljandi arbeiðspappír í Tjóðveldisflokkinum, og hetta var eitt av teimum, sum SvF hevur funnið onkustaðni.

Men at SvF við hesum vil gera eina søgu um, at niðurstøðan av samgongufundinum varð gjørd upp á forhond, er beinleiðis skeivt og íspunnið.

Undirritaði fór á fund við samgonguflokkarnar og legði tær niðurstøður fram, sum flokkurin var komin til. Júst sum vit høvdu lovað at gera, áðrenn vit søgdu nakað alment. Eina útgávu, av hesum "misteinkiliga" pappíri, hevði eg við mær á fund. Um fundurin millum samgonguflokkarnar hevði gingið illa, so hevði verið ynskiligt hjá Tjóðveldisflokkinum at greitt frá støðuni beinanvegin.

Men tað gjørdist ikki aktuelt og tí heldur ikki skilagott at halda nakran tíðindafund um støðuna.

Kortini gleðast vit um, at tað eru stórtíðindir hjá SvF, at Tjóðveldisflokkurin eftir langa viðgerð hevur skrivað niður sínar niðurstøður á pappír.

Vit gleðast um, at tað eru stórtíðindir hjá SvF, at Tjóðveldisflokkurin eisini hevði fyrireikað seg til ein tíðindafund, um samgongukreppan stóð við.

Vit gleðast um, at tað eru stórtíðindir hjá SvF, at undirritaði enntá munnliga hevur endurgivið burturúr teimum niðurstøðum, sum flokkurin hevði skrivað.

Kanska kundu vit ynskt okkum, at SvF hevði spurt okkum, hvør samanhangurin var, men so var sjálvsagt ongin søga.

Og ja. vit fyrireika okkum í Tjóðveldisflokkinum til ymsar støður og tosa um, hvat skal sigast. Vónandi gera onnur tað eisini.

*(Eg skal gera vart við, at hesar reglur vórðu skrivaðar, áðrenn tær vóru sendar, og at eg kanska kann finna uppá seinni munnliga at siga setningar burturúr hesum. Um nú SvF skuldi havt brúk fyri nýggjum høvuðstíðindum).*

# Tjóðin hildin fyri spott av fjølmiðlatølaranum og fólkavillaranum

**Hans Pauli Strøm**
*javnaðarmaður*



Sannføri, Sakligheit, »Klokkuklárar mannagongdir«, »Treytaleyst nærlagni« og tílík slagorð skuldu vera søluvørumerkið hjá Høgna Hoydal á leið hansara til maktina, fyrst í Tjóðveldisflokkinum og síðani í fullveldisríkinum Føroyar. Og hann spardi ikki uppá krútið at leggja sínar mótstøðumenn undir júst tað øvugta, ósakligheit, lygn og manipulatión.

Nú er hann tikin í at hava skapt og hildið lív í eini stjórnarkreppu og lagt eina leikskrá til at manipulerað fjølmiðlarnar við og fuppa Føroya fólk - alt fyri at fjala út yvir sína totalu politisku kapitulatión.

Tað er onki galið í tí at ein politikari og floksformaður fyrireikar seg og planleggur, hvat hann skal gera og siga, at hann ger sær eitt manuskript og er klárur, tá hann skal greiða frá síni støðu og sínum avgerðum.

Men tað álvarsliga og óhugnaliga er tað, at hetta var eitt nágreiniligt leikrit at draga fjølmiðlarnar upp á tráð í eini tilætlaðari roynd at villleiða Føroya fólk.

Tað hevur verið hugstoytandi seinastu árini at síggja henda áður so stolta Tjóðveldisflokkin við progressivum tjóðskaparligum og samfelagspolitiskum traditiónum, nú undir leiðslu Høgna Hoydals verða traðkaðan niður og drignan gjøgnum fólkaflokssvansið (sí m.a. Fregnir frá síðsta vikuskifti um Fólkafloksins politisku korruptión).

Fyri hvat? Nú tá samanum kemur, fyri onki, uttan nakað úrslit - bert fyri at vera endaður í ein sjálvstýrispolitikki, sum enntá liggur aftan fyri Sambandsflokkin, og á øðrum økjum í einum nýkonservativum fólkaflokspolitikki.

Tjóðveldisflokkurin hevur tó seinastu mánaðirnar havt fleiri møguleikar at reisa seg úr fólkafloksflóðrinum og rætta ryggin m.a. við ítøkiligum samstarvi við Javnaðarflokkin á fleiri økjum. Í míni býttheit trúði eg upp á møguleikarnar fyri einum progressivum samstarvi millum hesar báðar flokkar. Tí er tað bæði hugstoytandi og flóvisligt at uppdaga, at ein sjálvur eins og alt Føroya fólk er hildið fyri tað turra spott av væltalandi og orðfagra formanni Tjóðveldisfloksins.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Manuskriptið til fullkomna sjónleikin

**– Tók Høgna Hoydal 11 dagar at skriva**

**Johan Dahl**
*Løgtingsmaður*



Tað er heilt ótrúligt sum cand.commarin hjá tjóðveldinum má halda at Føroya Fólk verða bláoygt.

Sum vit øll sóu í Degi og Viku týskvøldið, so var manuskriptið lagt til rættis í detaljur, við replikkum, høvuðsleikarum og statistum og øðrum marionetsdukkum, sum á ymsan hátt skuldu proklamerað »endurføðingina« hjá tí, sum einaferð bleiv nevnd fullveldissamgongan.

Enn einaferð hava hesir gjørt seg til láturs í eygum fólksins, men tað sær ikki út til at rína á teimum, alt verður sligið upp í glens og bagateliserað, og sjónleikurin Sirkus Tinganes heldur áfram fyri opnum teppi - soleiðis sum Annfinn og vinmenn (altso sangarin Anfinn & vinmenn, so beinrakið sungu fyri árum síðani).

Ikki tí, neyvan nakar hevði væntað annað, enn at Fólkaflokkurin enn einaferð fór at draga tjóðveldisgarduna eftir hárunum upp á pláss

Klípurnar báðar - Miðflokkurin og Sjálvstýrarin hava ikki tað stóra at skulu hava sagt annað enn at verða tað reina kitt, makka rætt, goyggja eitt sindur av og á fyri at tilfredsstilla baklandið og fjølmiðlar, og so er alt sagt - teir halda at nú stendur væl til aftur í føroyskum politikki.

Landsantikvarurin og onnur »pínlig« samgongumál skulu nú tigast og gloymast burtur, og Heini O. Heinesen man ivaleyst eisini ein av næstu døgum taka sítt mál um brotying í § 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap afur og so er aftur »fryd og gammen« og syngjast kann »bíða bara inntil næstu ferð, inntil næstu fer í vit klórast«.

Tann einasti sum njótir gott av øllum hesum hurlivasa er Fólkaflokkurin - hetta leggur eitt roykslør yvir teirra »politikk«.

Show hava vit fingið nokk av og tað skortar ikki upp á undirhaldarar í samgonguni - men politikkur er ikki til at fáa eyga á - tað mugu sjálvt teir grammastu fullveldisveljarirnir ásanna.

At veljarin fær tað sum nevnist »politikara-leti« tað sigi eg teir ikki ringar fyri, tí tað sum fyrigongur seg á politisku arena'ini er stór skomm og niðurbrýtur alt álit á politisku skipanina.

Mál teirra er nú skjótast tilber at fáa avgreitt øll tingmál og fáa tingmenn heim , tí so hava teir fáa »arbeiðsfrið« og frítt slag til ólavsøku og kanska 2-3 mánaðir framm afturat.

Eitt av aðalmálunum av sera stórum týdningi fyri samgonguna og sum má loysast er uppskotið um hjá Anfinn Kallsberg og hansara monnum, enn einaferð at royna at fáa eftirlønina til landsstýrismenn upp á pláss og avgreidda í hesi tingsetuni, so kunnu teir slappa av.

Annars er mín metan, at Anfinn Kallsberg ivaleyst man ætla sær at sleppa endanum um ikki so langa tíð - onkur fuglur hevur sungið um stjórasess, sum kanska verður fríur um ikki so langa tíð orsakað av, at sitandi stjórin er komin til eftirlønaraldur - so hvat hevði verið meira passandi, enn at ein sitandi løgmaður avloysur ein fyrrv. løgmann – livst so spyrst.

The Show must go on – fyri einhvønn prís fyri Tjóðveldisflokkin, sjálvt um teir eftirhondini eru blivnir ikki sørt láturligir í føroyskum politikki.

# Kjølurin strektur á nýggja Smyrli





*Kjølurin til nýggja Smyril varð strektur í gjár*

**Nýggi Smyril skal eita Smyril. Tað hevur landsstýrismaðurin gjørt av. Kjølurin var strektur í gjár**

NÝGGJUR SMYRIL

Kjølurin er nú strektur á nýggja suðuroyarskipinum. Skipasmiðjan í San Fernando í Suðurspania, har nýggja suðuroyarskipið verður bygt, hevur seinastu mánaðarnar skorið stál til nýggju ferjuna, og í dag, mikudagin 19. mars, var komið so mikið langt, at kjølurin kundi strekkjast.

Hetta varð hátíðarhildið á lítlari samkomu á skipasmiðjuni í San Fernando, har landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, luttók saman við umboðum frá Strandfaraskipum Landsins, Vinnumálaráðnum og ráðgevandi fyritøkuni Knud E. Hansen, sum hevur prosjekterað skipið.

– At strekkja kjølin á hesum skipinum er eitt týðandi stig á leiðini at fáa eitt dagført ferjusamband til Suðuroyar. Byggingin er nú av álvara byrjað, og tað er av alstórum týdningi, at neyvt eftirlit verður í allari byggifasuni. Eg eri tó sannførdur um, at Strandfaraskip Landsins saman við ráðgevum sínum fer at megna hesa uppgávu, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum var hjástaddur í San Fernando í Spania.

Landsstýrismaðurin hevur avgjørt, at nýggja suðuroyarskipið skal eita Smyril, og at heimstaðurin hjá skipinum verður Tvøroyri.

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins, Kristian Davidsen, var eisini vælnøgdur.

– Eg eri sera fegin um, at gongd er komin á byggingina, og at tíðarætlanin higartil heldur. Tað er av alstórum týdningi fyri møguleikarnar hjá SL at veita viðskiftafólkunum eina nøktandi tænastu, at gomlu strandfaraskipini verða útskift við nýggjari materiell. Harumframt hevur tað týdning, at arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum verða betri, segði Kristian Davidsen.

Nýggja suðuroyarskipið fer at taka 976 ferðafólk og uml. 200 persónbilar. Sambært byggisáttmálanum við spanska skipasmiðjusamtakið IZAR skal skipið latast landinum í seinasta lagi 12. oktober 2004.

# Sjálvt ekspertar klára ikki at fyribyrgja sjálvmorði...

**- Tað, sum vit royna, er at fáa fólk, sum ikki orka at liva meira, at hóma onkra loysn í lívinum, sigur Eyðun Joensen, sálarfrøðingur**

SÁLARMØÐI
*Vilmund Jacobsen*



*Eyðun Joensen, sálarfrøðingur*

Sunnudagin var Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, úti í Nólsoy og greiddi frá ymiskum orsøkum, sum kunnu viðvirka til, at summi fólk ikki orka at liva meira.

- Eg haldi, at hetta var ein góður fundur, sum vardi hálvan triðja tíma við einum kaffisteðgi. Eini 60-70 fólk møttu á fundinum, og tað er nógv í eini so lítlari bygd.

Eyðun sigur, at fólk í bygdini høvdu reist ynski um at fáa eitt fakfólk út at tosa um hesi viðurskifti.

- Tá ið slíkt hendir, eru fólk skelkað og torført kann vera at byrja vanliga gerandisdagin aftur, sigur hann.

Ein av treytunum, ið Eyðun setti, var, at fundurin ikki skuldi lýsast alment, tí fólk, sum hava verið í slíkari vanlukkuligari støðu, havi ikki uppiborið at verða skemd á nakran hátt.

Eyðun sigur, at nógvir spurningar vórðu reistir, og endamálið hjá honum við fundinum var at ugga og fáa fólk at skilja, at eingin megnar at fyribyrgja slíkum, tá ið ringast vil til – og eingin er sekur í tí, sum hendir.

- Sjálvt ikki vit, sum eru ekspertar á økinum, megna at fyribyrgja, at slíkt ikki hendir.

Hann sigur, at á deildunum í Havn eru fólk væl vard, og nógv fakfólk eru rundan um tey, sum eru sjúk.

- Kortini hendir tað syrgirliga, at onkur fer burtur ímillum, sigur hann.

Eyðun sigur, at hann greiddi frá, hvussu roynt verður at "lesa fólk av", sum eru tyngd og ikki orka at liva meira.

- Tað, sum vit royna, er at fáa hesi fólk, sum eru í eini vanlukkuligari støðu, at hóma onkra aðra loysn í lívinum, tí tað eru altíð aðrir útvegir, sigur Eyðun Joensen, sálarfrøðingur.


VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2